


*Skipaðum fótbóltsspæli var lítið og einki av, tá B68 og ÍF møttust á Svangaskarði í nógva vindinum mánakvøldið. Seks av teimum sjey málunum komu eftir deyðbóltsstøður*

Mynd: Álvur Haraldsen

# Nógv mál í vindinum

**VODAFONEDEILDIN** Ikki færri enn sjey mál komu, tá ÍF mánakvøldið vann 4-3 á B68, men venjararnir báðir eru samdir um, at dysturin á Svangaskarði ongantíð skuldi verið settur í gongd, tí vindurin var alt ov nógvur

Hilmar Jan Hansen

**B68** 3

**ÍF** 4

Líkindini til fótbólt vóru sera vánalig, og tí fekk hvørki liðið víst nakað spæl av týdningi. Og ein onnur avleiðing av veðrinum var, at tað var mestsum vónleyst at vera málmaður, tí vindurin ávirkaði so at siga hvørja einastu roynd á málini. Skipaðum fótbóltsspæli var lítið og einki av, og ógvuliga freku ælingarnir gjørdu ikki umstøðurnar betri, hvørki hjá spælarunum ella áskoðarunum.

Tá avtornaði, vann ÍF dystin 4-3, men lýsandi fyri umstøðurnar var, at av teimum sjey málunum, var tað bara eitt, ið ikki kom eftir deyðbóltsstøðu. Ibrahima Camara legði tíðliga B68 á odda, tá hann lobbaði upp um Jákup Mikkelsen, men øll tey eftirfylgjand málini komu eftir hornaspørk og frí-spørk.

– Fleiri av okkara spælarum vildu hava dómaran at bríksla av, men tað vildi hann ikki. Vit kundu sjálvandi fegnast um, at vit vunnu dystin og fingu trý stig, men í veruleikanum var alt ein stór tilvild. Nú haldi eg, at vit skuldu fingið ásett, hvussu ringum veðri tað ber til at spæla í, sigur venjarin hjá ÍF, Abraham Løkin.

Hann fær fulla undirtøku frá venjaranum hjá B68, Bill Mc. Leod Jacobsen, sum heldur ikki helt tað geva nakra meining at spæla í vindinum, sum var.

– Nei, hasin dysturin skuldi ongantíð verið settur í gongd, tí har var ikki spælandi. Annars helt eg, at vit vóru nógv betri enn teir í fyrra hálvleiki, men ikki nóg klókir í seinna. Tað hjálpti tó einki, tí vit fingu ikki tað burturúr, sum vit fóru eftir, sigur B68-venjarin.

Støðan í hálvleikinum var 2-2, men í seinna hálvleiki fór ÍF upp á 4-2, og hóast B68 fekk minkað um munin, gjørdist tað ov tungt at berjast ímóti bæði vindinum og fuglfirðingum, so tey trý stigini endaðu tí øll í Fuglafirði.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

# Kappingarnevndin lagt frá sær

**HONDBÓLTUR** – Hondbóltssambandið hevur ikki stuðlað okkum yvirhøvur í hesi trætuni, og tí hava vit lagt frá okkum, sigur Julian Olsen, fyrrverandi formaður í kappingarnevndini

Uni Holm Johannesen

Ein avleiðing av ætlaða verkfallinum hjá hondbóltsdómarunum, sum tó gjørdist av ongum, tá avtala fekst við leiðsluna í Hondbóltssambandinum um eina aganevnd, er nú, at kappingarnevndin hjá Hondbóltssambandinum hevur lagt frá sær.

Julian Olsen, sum hevur verið formaður í kappingarnevndini, er vónbrotin av viðferðini, nevndin hevur fingið frá Hondbóltssambandinum, tí henni var álagt at geva sum danska hondbóltssambandið eisini brúkar.

Undan hesum kappingarárinum vórðu reglurnar herdar munandi. Endamálið hjá altjóða Hondbóltssambandinum, IHF, var at gera hondbóltin minni vandamiklan, og at fáa positivari hugburð í sjálvt spælið.

Trupulleikin er, sambært Julian Olsen, at karatenulistin ikki er dagførdur samsvarandi, so hendingar, sum góvu leikbann í tveir dagar í fjør, geva eisini leikbann í tveir dagar í ár.

Fyribils er ein nevnd sett at taka sær av kærum og øðrum restina av hesum kappingarárinum, nú bara finalurnar um føroyameistaraheitið eru eftir.

*uni@sosialurin.fo*

# 16 FM-finalur á Hálsi

**NEMA FM** Leygardagin hava badminton, borðtennis og judo sín felags finaludag, sum hesa ferð fevnir um ikki færri enn 16 avgerandi finalur í teimum trimum greinunum

Hilmar Jan Hansen

Hetta er annað árið á rað, at ítróttarhøllin á Hálsi er karmur um stóra FM-finaludagin, sum annars hevur fleiri ár á baki. Tað byrjaði í 2006, tá badminton og borðtennis gingu saman um ein finaludag, og árið eftir kom so judo aftrat.

Tær tríggjar ítróttargreinarnar gera nógv burtur úr umstøðunum kring finalurnar, og somuleiðis fer Kringvarp Føroya at senda beinleiðis frá klokkan 14 og til síðsta steypið er handað. Annars byrjar sjálvt tiltakið í høllini á Hálsi longu klokkan 9.30 leygarmorgunin.

Um kvøldið verða stór gallaveitsla, har eitt nú verða latin »ársins herðaklapp« í bæði badminton, borðtennis og judo.

# Julian aftur á Toftum

Hilmar Jan Hansen

Í kvøld, frá klokkan 19 til 20.15 fer Julian Johnsson sjálvur annar at hava fyrilestur í ítróttarhúsinum hjá B68 á Svangaskarði, har nútímans talentmenning av ungum fótbóltsspælarum verður á skránni. Julian er kendur á Toftum, har hann var spælandi venjari í 2005 og ein part av 2006.

Umframt Julian, fer eisini leiðarin fyri Oure Fodboltakademi, Johnny Johansen, at greiða frá, hvussu tey í Oure hugsa yvirskipað um talentmenning, hvat pedagogiska grundarlagið er og hvussu tað við venjing í gerandisdegnum skal bera til at fáa sum mest burtur úr evnunum hjá spælarunum.

Oure Fodbold Akademi hevur eitt nú verið við til at ment spælarar sum Mads Juncker og Kasper Schmeichel.

## B68 - ÍF 3-4 (2-2)

Dómari: Eiler Rasmussen

**1-0: Ibrahima Camara, 9.**
**1-1: Frank Poulsen, 30.**
**1-2: Christian Chinedu Muornaife, 42.**
**2-2: Kristian Anton Andreasen, 45.**
**2-3: Christian Chinedu Muornaife, 52.**
**2-4: Dánjal á Lakjuni, 58.**
**3-4: Kristian Anton Andreasen, 62.**

**B68:** Tórður Thomsen – Jóhan Petur Poulsen, Oddur Højgaard, Niclas Joensen, Dánjal Pauli Højgaard – André Olsen (Óli Olsen, 74.), Ndende Adama Guéye, Remi Langgaard (Eli Simonsen, 90.) – Jónleif Højgaard (Ahmed Keita, 63.), Kristian Anton Andreasen – Ibrahima Camara
**ÍF:** Jákup Mikkelsen – Áki Petersen, Bartal Eliasen, Uni R. Petersen, Jan Ó. Ellingsgaard – Høgni J. Zachariassen, Karl Løkin, Frank H. Poulsen, Fritleif í Lambanum – Dánjal á Lakjuni (Aleksandar Jovevic, 77.), Christian Chinedu Muornaife (Ari Ó. Ellingsgaard, 88.)
Gult kort: Bartal Eliasen, Karl Løkin




## Føroyska Vodafonedeildin

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | + MÁL | - MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 1 | 1 | 0 | 0 | 6 | 0 | +6 | 3 |
| 2 | B36 | 1 | 1 | 0 | 0 | 3 | 0 | +3 | 3 |
| 3 | ÍF | 1 | 1 | 0 | 0 | 4 | 3 | +1 | 3 |
| 4 | NSÍ | 1 | 1 | 0 | 0 | 2 | 1 | +1 | 3 |
| 5 | EB/Streymur | 1 | 1 | 0 | 0 | 2 | 1 | +1 | 3 |
| 6 | B68 | 1 | 0 | 0 | 1 | 3 | 4 | -1 | 0 |
| 7 | Víkingur | 1 | 0 | 0 | 1 | 1 | 2 | -1 | 0 |
| 8 | HB | 1 | 0 | 0 | 1 | 1 | 2 | -1 | 0 |
| 9 | 07 Vestur | 1 | 0 | 0 | 1 | 0 | 3 | -3 | 0 |
| 10 | B71 | 1 | 0 | 0 | 1 | 0 | 6 | -6 | 0 |